FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

# Leiðslufundur 10. november 2015

| | |
|---|---|
| Heiti: | Leiðslufundur |
| Til staðar á fundinum vóru: | Sigurð í Jákupsstovu (SíJ), Malan Marnersdóttir (MM), Hans Pauli Joensen (HPS), Óli Simonsen og Jørgen Meitilberg (JM) |
| Skrivað hevur: | JM |
| Fundartíð: | Týsdagur, 10. november 2015 kl. 9-12.30 |
| Fundarstað: | SSS |

**Mál til støðutakan:**

**Mál til umrøðu:**

1. **Skelti v.m. til Fríðriks Petersensgøtu**
   Setrið hevur fingið tilboð frá Sendistovuni um skelti. JM arbeiðir víðari við málinum.
   Tørvur er á ymiskum praktiskum tingum til starvsfólkini í Fr.P gøtu t.d. borðlampur, whiteboard, fundarborð og annað. JM ger ein lista.
   Bøkurnar og tíðarritini fylla ov nógv í miðhæddini. Starvsfólk á SSD mugu gjøgnumganga tilfarið fyri at rudda út.

2. **Góðskrivingar**
   Sambært viðtøkunum fyri lestrarráðið góðkennir lestrarráðið góðskrivingar eftir tilmæli frá útbúgvingarleiðara. Um einki lestrarráð er, góðkennir dekanurin góðskrivingar eftir tilmæli frá útbúgvingarleiðara.

3. **Próvtøkur**
   Ynski er um at próvtøkurnar verða skipaðar eftir sama leisti á øllum deildum. Tað er stórur munur á mannagongdunum á ymsu deildunum. Á NVD er tað deildarskrivstovan sum hevur fyriskipað próvtøkuhaldið, meðan tað á SFD og NÁD eru lærararnir, sum gera tað. Eitt oyðiblað eigur at gerast, ið skal fyllast út til hvørja próvtøku. Oyðiblaðið skal innihalda krøv til próvtøku, freistir, hjálparamboð, tøkni, netatgongd v.m. JM ger útkast.

   *Niðurstøða*
   Regluverkið umkring próvtøkur skal endurskoðast, t.d. hava vit ótíðarhóskandi reglur frá 1990. Relguverkið skal millum annað innihalda reglur fyri próvtøkuvaktir, hjálparamboð, krøv til innlating, varðveitslu av uppgávum, atgongd til internet o.s.fr.
   Leikluturin hjá Lestrarskrivstovuni í mun til próvtøkur skal lýsast.

FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

**Kunning**

**Kl. 10.30**

Vitjan av Anne Haglund-Morrissey serfrøðingi í Horizon 2020 og Anna-Karin Runemo umboðandi EASME

*fyrisitingarstjórin*